# Tað ræður um at fylgja við

Ein myndatól kann avdúka løgnar støður. Eitt klikk, og løtan er fryst fast fyri ævir. Og tað kann sanniliga síggja skemtiligt út, tá ið fólk fáast við ítrótt og veruliga kýta seg, samstundis sum myndin verður tikin. Her síggjast tvey dømi um borðtennisspælarar, sum ivaleyst síggja meira skilagóðir út í tí privata – eftir at dystur er lokin





# Gott við fNriskari luft

Einki er sum at fáa eitt sindur av frískari luft. Hesin hundurin hevur stungið høvdið út gjøgnum bilrútin og kann njóta vindin í andlinum

# Hey tit, hatta er skeivan veg

Hesi flogfør hava beina kós – skeivan vegin. Men eingin vandi er á ferð, tí talan er um eitt show hjá U.S. Navi Blue Angels, sum er víðagitið fyri at kunna spæla sær á flogi. Her eru flogførini stadd omanfyri Brunswick Naval Air Station í Brunswick, og showini hjá flogførunum har á leið fara at fækka, tí flogvøllurin skal lata aftur í 2011.



# Í rangastrúpan

*Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.*

**Gearstong í posanum**
Litavar hava hálað eitt gear afturat upp úr posanum.
Frásøgumaður í SvF

**Stakkals Anfinn**
Skógvarnir hjá Kallsberg ov stórir
Dimmalætting

**Ja, hvør annars skuldi tað**
Føroyingar skuldu sjálvir valt bisp
Vikublaðið

**Nei, tað ornar havið**
Vit mugu ikki avbyrgja okkum í Norðuratlantshavi
Bispavalevni í Sosialinum

**Hálvvaksin dagrøktarbørn**
500 í dagrøkt í 20 ár
Sosialurin

## Leyst og fast um stórt og smátt

"Bara rík sleppa á ting við einum valdømi" sigur onkur klók(ur)! Veit ikki um nakran fátækan løgtingsmann við 7 valdømum??

Sosialurin er farin at innrætta loftið í Miðlahúsinum til nýggja loftmiðlavirksemið

Mangir leikir í longum talvi. Teir sum stilla upp til bisp SKÁKA sær ikki undan!

Ákæruvaldið hevur fingið klørnar í Georg L. Petersen, sum er so HUMMARreyður!

Hummararúsur í rættinum

Í framtíðini skal ein ringja til danska ákæruvaldið áðrenn ein ætlar at krøkja maðk!

Linda Hesselberg fer eftir hvørjum útróðrarbáti, sum hevur gágguknúsara. Skjótt liggur allan flotin!

Og ikki at hugsa um tey, sum drukna dreparsniglar í øli. Á dett spill!

Ella tær heimagjørdar vespufellurnar!

Stik den Linda!